# Fleiri tilboð í ferðavinnuni

**Tey, sum bjóða seg fram í ferðavinnuni, gerast fleiri í tali. Tað ger eisini, at krøvini til tann einstaka herðast, og neyðugt er at spenna seg enn meira út, sigur leiðarin á Kunningarstovuni í Vágum**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*

**Vágar:** Tað tykist, sum alt fleiri og fleiri eru farinn at síggja ferðavinnuna sum eina rættiliga vinnu, sum kann geva inntøku, sigur Anna Sofía Nordendahl, leiðari á Kunningarstovuni hjá Felagnum Vágum.

Hetta ger so eisini, at krøvini, sum tann einstaki útbjóðarin má seta sær sjálvum fyri at vinna á kappingarneytanum, herðast, sigur hon.

Tað er nógv at gera á Kunningarsovuni í Miðvági og Kunningardiskinum á flogvøllinum, sigur leiðarin. Serliga nógvir útlendingar koma framvið. Men eisini nógvir føroyingar vísa áhuga fyri at ferðast í Vágum.

Útlendingarnir, sum spyrja eftir gistingarmøguleikum vilja hava ból og bita. Føroyingarnir spyrja serliga eftir summarhúsum, sigur kunningarleiðarin. Men hon harmast um, at útboðið av gistingarmøguleikum er ov lítið í Vágum. Serliga ringt er at fáa summarhús, hóast heilt nógv hús dagliga standa tóm í oynni.

– Verður spurt hjá teimum einstøku útbjóðarunum, verður helst svarað ymiskt upp á, hvussu nógv er at gera. Ivaleyst er onkur, sum heldur, at tað er minkandi. Men tað kemst so aftur av, at tað eru fleiri, sum bjóða seg fram. Og tað herðir kappingina og krøvini.



*Tað eru serliga siglitúrarnir fram við landi, ið tykjast áhugaverdir, og alt fleiri útbjóðarar eru, sigur kunningarleiðarin í Vágum. Møtir tú so einum tveimum kópum millum flesjarnar, tykist túrurin fyri fleiri at vera fullkomin*

*Mynd: Edvard Joensen*

Serliga eru tað teir, sum sigla við ferðafólki undir bjørgunum, sum fáa kapping. Til dømis eru tveir útbjóðarar í Sørvági, sigur kunningarleiðarin.

Hinvegin tykist minni vera av gongutúrum í oynni, sigur hon. Har kann ein grund vera, at onkur útbjóðari beinleiðis hevur tikið hesar tilrættaløgdu túrarnar av skránni, fyri at fólk heldur skulu fáa møguleika at velja, tá tey biða um tann einstaka túrin. Pakkatúrarnir eru farnir, sigur leiðarin á Kunningarstovuni í Vágum.

# Fleiri fólk á færri ferðum

**Hóast talið á fráferðum og komum um flogvøllini Vágum er minkað í mun til í fjør, eru ferðafólkini, sum ferðast um flogvøllin, kortini fleiri í tali enn í fjør**

HAGTØL
*Edvard Joensen*

Ferðafólkini, sum ferðast um flogvøllin í Vágum, gerast alt fleiri í tali. Fyrra hálvár í ár ferðaðust 1,8 prosent fleiri fólk um flogvøllin, enn tey gjørdu somu seks mánarnar í fjør.

Ferðafólkatalið um flogvøllin í Vágum er vaksið hvønn mánað í ár í mun til í fjør uttan í juni, vísa hagtøl frá flogvøllinum í Vágum.

Jákup Persson, varaleiðari á flogvøllinumi Vágum, sigur, at tað er fótbólturin, sum »hevur skyldina«, sum hann tekur til.

Í juni í fjør ferðaðust 8,7 prosent fleiri fólk um flogvøllin, enn tey gjørdu sman mánað í ár. Fráferðirnar og komurnar vóru í fjør heili 15,9 prosent fleiri enn í ár.

Tað hevur sína frágreiðing í, at týskarar vóru her og spældu fótbólt í juni, eins og føroyingar vóru í Íslandi og leiktu. Í tí sambandinum var heilt nógv ferðing, greiðir Jákup Persson frá.



*Hóast tað viðhvørt hevur verið trongligt á flogvøllinum í Vágum í ár, eru fráferðir og komur fækkaðar munandi higartil í ár í mun til í fjør. Kortini er samlaða ferðafólkatalið hægri í ár enn í fjør*

Tað sæst eisini aftur í talinum av ferðum til og úr Bretlandi, sigur hann. Samlaðu túrarnir til og úr Bretlandi eru fækkaðir við ikki færri enn 30,7 prosentum. Týskarar høvdu leikt í Skotlandi, beint áðrenn teir komu til Føroya, og tí vóru eisini fleiri flogfør haðani við týskum viðhaldsfólki.

Eitt annað, ið ávirkar talið á fráferðum og komum eitt sindur, er tað, at flúgvinigin til Íslands í vetur bert hevur verið við flogførunum hjá Atlantsflogi, sum eru størri og tí klára flutningin við færri túrum, enn tey smærru íslendsku flogførini. Íslendingarnir eru júst byrjaðir aftur at flúgva fyri summarið, sigur Jákup Persson.

Eisini hevur tyrluflúgvingin verið nakað minni í ár enn í fjør, og tað sæst eisini aftur á hgatølunum, sigur hann. Tyrlan verður eisini skrásett við komu og fráferð.

Tað, sum hugaligt er at síggja í hagtølunum, er, sigur Jákup Persson, at tær føstu ruturnar hava framgongd.

Danmarkarrutan stendur fyri einum vøkstri upp á heili 4,8 prosent, og samanlagt er vøksturin á rutunum 3,3 prosent, hóast lækkingina í talinum á fráferðum og komum.

– Tað er hóast alt teimum føstu rutunum, livast skal av. Leigutúrarnir koma so sum eitt ískoyti, sum er gott at fáa, sigur varaleiðarin á flogvøllinum í Vágum.

Eisini í aðrar mátar eru bæði vøkstur og minking at merkja, sigur hann. Serliga er postflutningurin minkaður. Men farmaflutningurin er kortini vaksin nakað í mun til í fjør.

Hví postflutningurin um flogvøllin er minkaður, dugir Jákup Persson ikki at siga. Um tað man vera tí, at minni postur verður sendur soleiðis yvirhøvur, ella um aðrar orsøkir kunnu vera fyri tí.

– Um tað hendir seg, at plásstrot er í flogførunum, kemur tað fyri, at flogpostur verður sendur við skipi, so tað kann vera ein orsøk, heldur hann uttan tó at siga tað fyri vist.

Hinvegin er farmaflutningurin vaksin. Serliga í mei mánað er ein øgiligur vøkstur í prosentum í mun til mei mánað í fjør. Men tað kemst uttan iva av, at í mei í fjør var verkfall í Føroyum, vísir hann á.

Jákup Persoson vísir á, at hagtølini kunnu tykjast rættiliga svingandi í samband við post- og farmaflutning um flogvøllin, tí samlaðu nøgdirnar eru so smáar, at broytingar síggjast so øgiliga væl aftur.



# Reiðarar mugu vísa serliga ábyrgd ímóti samfelagnum

**– Ein máti kann vera at leggja eitt serligt avgjald á fisk, sum fer óvirkaður av landinum, sigur formaðurin í Føroya Arbeiðsgevarafelag. Men hann sigur ikki, at hetta er tað rætta**

KOSTNAÐARSTØÐIÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialinum.fo*

– Ein máti kann vera at leggja eitt serligt avgjald á fisk, sum fer óvirkaður av landinum.

– Hinvegin skal eg ikki siga, at hetta er tað rætta. Men eg skilji sjónarmiðið!

Johan Páll Joensen, formaður í Føroya Arbeiðsgevarafelag, skilir tey, sum halda, at landið eigur at leggja eitt serligt avgjald á fisk, sum fer óvirkaður av landinum.

Men hann leggur kortini afturat, at hetta er ein ógvuliga fjøltáttaður spurningur og hann sigur ikki, at eitt avgjald er tað rætta.

Hann leggur eisini dent á, at arbeiðsgevarafelagið hevur ikki viðgjørt hendan spurningin enn, so hansara hugsan stendur fyri egnu rokning.

Men at tankin kemur fram, undran hann ikki.

– Tað eru ikki so nógv ár síðani, at øll kundi fiska, sum teimum lysti. Ein og hvør, sum átti pening, kundi útvega sær skip, sum honum lysti, hann kundi fiska har honum lysti, hann kundi selja fiskin har honum lysti og hann keypti sínar vørur og tænastur har honum lysti.

– Og hóast fiskivinnan fekk næstan eina hálva milliard í stuðuli afturat, fór hon so logandi á heysin, sjálvt um hon hevði fullkomiliga fríar ræsur at virka.



*Formaðurin í Føroya Arbeiðsgevarafelag skilir sjónarmiðið um at leggja avgjald á fisk, sum fer óvirkaður av landinum. Reiðarar við fiskiloyvi eiga at vísa eina serliga ábyrgd mótvegis samfelagnum, sigur Johan Páll Joensen*

Hava latið fiskiloyvið inn Síðani eru stórar avmarkingar settar í gildið.

– Tað, sum er hent, er, at allir føroyingar gjørdu eina semju. Hendan semjan var í veruleikanum tann, at allir føroyingar lótu síni fiskiloyvi inn, so at nakrir heilt fáir reiðarar kundi fáa tey fyri einki.

Men tað hevur Johan Páll Joensen ikki stórvegis trupulleikar av, tí tað er ikki her, at trupulleikin liggur,

– Men teir fáu, sum síðani hava fingið fiskiloyvi frá øllum føroyingum, eiga at vita, at teir hava skyldu til at vísa eina heilt serliga ábyrgd mótvegis samfelagnum.

– Tað mugu teir hava. Vit eru samd um at rættindini hjá næstan øllum føroyingum skuldi avmarkast og leggjast upp í hendurnar á nøkrum heilt fáum. Tí mugu teir, sum hava fingið hesi framíhjárættindi, eisini vera greiðir yvir, at teir hava eina heilt serliga ábyrgd ímóti øllum hinum føroyingunum.

– Men hetta er eitt ógvuliga trupult mál og hvussu hendan ábyrgd skal vísast í verki, veit eg ikki.

– Eg veit heldur ikki um hon skal síggjast aftur í einum serligum avgjaldi á fiski, sum fer óvirkaður av landinum.

Formaðurin í Føroya Arbeiðsgevarafelag sigur, at tað felags endamálið hjá okkum øllum eigur at vera, at vit byggja eina framleiðslu upp í Føroyum.

Hann sigur, at keypir eitt virki í Føroyum eina hýsu fyri 10 krónur, kann virkið økja virðið á henni upp í 15 krónur.

– Øll hendan virðisøkingin fer í umfar í føroyska samfelagnum og kemur sostatt okkum øllum til góðar.

Men verður ein hýsa seld uttanlands fyri 10 krónur, fáa vit onga virðisøking.

– Verður fiskurin seldur uttanlands, missir føroyska samfelagið eina munandi virðisøking. Tí skilji eg væl teir politikarar sum vilja leggja eitt ávíst avgjald á fiskin, sum er óvirkaður av landinum, so at føroyska samfelagið í hvussu so er fær ein lítlan part av virðisøkingini.

Hinvegin skilir hann eisini væl, at eru føroysku virkini ikki kappingarfør, er tað ein trupulleiki. Hann skilir eisini væl, at tað kann vera ringt at forða skipum at selja, har tey fáa besta prísin.

Kortini vísir hann á, at fyri trimum árum síðani vóru prísirnir í Føroyum altíð hægstir, bæði á toski, hýsu og á upsa.

– Men í ár og í fjør hava vit havt ein trupulleika - og so leypa øll skipini frá beinanvegin.

### Eina krónu minni at keypa fisk fyri

Og spurningin um kappingarførið heldur hann vera ein trupulleika fyri seg.

– Hesi seinastu árini er útreiðslustøðið í Føroyum hækkað meir í Føroyum enn hjá londunum rundaum okkum og tí hava vit fingið ein trupulleika.

– Hinvegin hevur tað almenna gingið undan at hækka lønirnar í Føroyum og eg skilji væl arbeiðarafeløgini, at tey ikki vilja vilja dragna longur frá teimum almennu lønunum og tey sostatt eisini seta síni lønarkrøv.

Formaðurin í Føroya Arbeiðsgevarafelag vísur á, at hesi seinastu fimm árini er samlaða tímalønin farin úr 95 krónum, upp í 120 krónur um tíman.

– Tað merkir, at eitt virki, sum virkar hýsu, hevur fingið eina krónu afturat í útreiðslum til lønir av hvørjum kilo av ráfiski.

Sostatt er ein króna minni at keypa fisk fyri.

– Virkini hava gjørt sítt ítarsta fyri at laga seg til, við at leggja framleiðsluna um. Men tað er ikki nóg mikið.

Men kappingarførið er ikki bara ein spurningur um lønir. Orsøkin til trupulleikarnar er eisini, at marknaðurin yvirhøvur er slakur í løtuni. Og harafturat eru bæði amerikanski dollarin og bretska pundið fallið nógv. Sostatt er allur fiskur, sum verður keyptur og seldur í pundum og í dollarum, vorðin nógv bíligari.

– Sostatt ber til at keypa pollock úr Alaska nógv bíligari enn vant og tað ávirkar okkara upsaprís. Samstundis eru íslendingar, sum plaga at selja nógva hýsu til USA, farnir at selja í Bretlandi í staðin. Av tí sama er nógv hýsa á marknaðinum og tað trýstir prísin niður.

– Men hetta eru alt viðurskifti, sum vit onki fáa gjørt við.

– Tað einasta, vit fáa gjørt nakað við, er kostnaðarstøðið í Føroyum, sigur Johan Páll Joensen.

# Hava mist nógva jørð í havið

**Ígjøgnum tíðirnar hava sumbingar mist rættiliga nógva jørð, tí hon er skolað í havið í brimi. Tí er í tøkum tíma, at bakkaverjan verður gjørd og jørðina, teir hava mist, fáa teir ikki aftur**

BAKKAVERJA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Sumba er brimpláss burturav. Og brimið er so nógv, at tað máar alsamt meiri og meiri burtuav lendinum. Sostatt er ein munandi partur av lendinum, niðast við, skolað í havið av brimi.

Mátingar hava víst, at har brimið hevur máað mest burturav, eru eru heilir 17 metrar av lendi farnir í havið, bara hesi seinastu árini.

Sostatt eru tað nógvar traðir og nógvur bøur, sum av røttum skuldu gingið oman í mølina og heilt út á sjógv eftir matrikulnummarinum.

Og eftir uppmátingunum hjá matrikulstovuni at døma, skuldi tað sostatt eisini verið fleiri sumbingar, sum áttu langt oman í mølina og heilt út á sjógv.

### Bakkin er altíð mark

Men so er ikki!

Bygdaráðið í Sumba hevur sett sær fyri at kanna, hvussu langt oman í mølina, eitt matrikulnummar kann ganga.

Bygdaráðið vildi í sama viðfangi hava fulla greiði á, hvør í veruleikanum eigur mølina.

Á seinasta bygdaráðsfundi varð ein umfatandi løgfrøðilig frágreiðing løgd fyri bygdaráðið.

Og eftir henni er greitt, at ongin kann eiga longur oman enn á sjálvan bakkan.

So hóast eitt matrikulnummar av røttum gongur heilt oman í mølina og á sjógv, verður markið altíð sett við sjálvan bakkan.

Sostatt er tað, sum er máað í havið, mist.

– Niðurstøðan hjá løgfrøðinginum er sostatt, at ognarrætturin fellur burtur, so hvørt sum lendið máast burtur.

Sostatt gongur ein ogn ongantíð longur oman, enn oman á sjálvan bakkan, upplýsti Jacob Vestergaard, borgarstjóri, fyri bygdaráðnum.

Sjálv mølin er sostatt felagsogn.

Hesa seinastu tíðina hava sumbingar, við stuðuli frá landinum, lagt stóra orku í at at stoypa framvið bakkanum at verja fyri, at ikki meiri skal máast burturav lendinum.

Av tí, at so nógv verður máað burturav, er tað í tøkum tíma, at hendan bakkaverjan verður gjørd.

Men eftir niðurstøðuni hjá løgfrøðinginum, verður tað altíð bakkaverjan, sum verður mark fyri, hvussu langt oman ein ognari eigur, sama, hvussu nógv er máað burturav lendinum og, hvussu langt oman, stykkið hevur gingið.